**Formansfrágreiðing til aðalfund 18/03-23**

Hetta seinasta árið hevur TSF arbeitt miðvíst við at menna bygnaðin av Talvsambandinum, hetta er nakað, ið vit koma nærri inn á seinni í kvøld. TSF hevur eisini miðvíst arbeitt við at varpa ljós á telving í Føroyum og at fortelja tær góðu søgurnar. Tað er eingin loyna at áhugin fyri talvi í Føroyum er stórur, men TSF saman við feløgunum hevur ikki verið nóg atgeingiligt og er hendan støðan alsamt batna og fleiri og fleiri fólk, og stovnar, eru nú varugur við og gagnnýta telving sum amboð og hugna.

Talvsamband Føroya tók í fjør stig til at fáa Jesper Bergmark Hall á vitjan, ið samband við Chess in Schools, og nýttu vit samstundis møguleikan at knýta venjingar afturat unglingum og feløgunum. Hetta arbeiði hevur TSF áhaldandi roynt at ment og bygt víðari á tað góða arbeiði, sum Helgi Dam Ziska hevur gjørt úti á skúlunum. Fruktirnar av hesum arbeiði síggjast hvørt ár til Skúlakappingina, ið í fjør hevði uml. 500 luttakarar og spennandi verður at síggja hvussu undirtøkan verður í ár, um smáar 2 vikur.
TSF hevur eisini ynskt at førleikamenna og hjálpa feløgunum at gerast meiri virkin, og skipaðu við í tí sambandi eitt skeið í at nýta Swiss Manager og fingu feløgini hvør sína teldu. Tað er ein sannroynd at fleiri telvarar luttaka og leggjast afturat í økjum, ið fyriskipa kappingar, so tað er gleðiligt at feløgini bjóða seg fram at fyriskipa bæði GP kappingar og barnakappingar.

Tann meiri etableraða telvingin í Føroyum hevur koyrt sum vanligt við GP kappingum, har 93 luttakarar hava verið tilsamans higartil og hava kappingarnar verið spjaddar út um landið og hava fleiri feløg tikið kappingar til sín, ið annars ikki hava havt seinastu árini og er tað at gleðast um.
TSF hevur eisini í samband við GP kappingarnar "standardisera" vinningar, so allar eins GP kappingar hava somu vinningar, ið verða goldnir av TSF.
TSF hevur saman við feløgunum fyriskipa fleiri barnakappingar, bæði einstaklinga og liðkappingar og hevur luttøkan verið á eini leið, tó verður arbeitt við at gerast enn sjónligari og fáa enn fleiri luttakarar við í "formligu" talvkappingar, tí børnini telva úti á skúlum og á netinum, men bara ein brotpartur er við í kappingunum.

9 feløg luttaka í ár í liðkappingini og eru tilsamans 28 lið tilmeldaði í 4 deildum, umframt 6 lið frá 4 feløgum í unglingum, so vit hava 34 lið í telva í liðkappingini. Hetta er eisini ein øking í mun til í fjør og fyrraári.

Landsliðið hjá okkum hevur verið til OL og høvdu vit bestu styrkismeting, ið nýggjari tíð, kanska yvirhøvur, tað eru helst onnur fólk enn eg, ið vita tað betur. Tó gekk OL ikki eftir vild, og endaðu vit væl lægri enn okkara styrkismeting. Tað var fokus á hetta í fjølmiðlunum, og haldi eg sjálvur at hópurin í sínum lag og TSF tóku atfinningar til sín og hava lært av mistøkunum og tikið viðurskifti við sær í mun til fyrireikingar fram til kappingar og áhaldandi menning av landsliðnum.

Í hesum høpi var farið undir at skipa venjingar við einum hópi saman við Ivan Sokolov og er vónin at hetta arbeiði kann menna telvarnar einkultvís, og sum hóp, samstundis sum hetta vónandi kann opna hurðar til at TSF kann fáa ein landsliðsvenjara knýttan at hópinum til dagligt og til stórar kappingar.

Talvsambandi hevur eins og vanligt luttikið til NM fyri skúlaungdóm og eru vit í TSF tilvitaði um, at tað krevst miðvíst arbeiði fyri at bøta um úrslitini og styrkja, kanska serliga yngru bólkarnar.

Fyri fyrstu ferð í fleiri ár skipaði TSF fyri FM fyri gentur og luttóku 13 gentur og koma nakrar av hesum at umboða Føroyar til NM fyri gentur.

At enda kann nevnast at Talvsamband Føroya hevur luttikið í 2022 á aðalfundi í ECU (European Chess

Union), og luttók eg sjálvur á tí fundinum. Hetta var eitt gott høvið at knýta persónlig sambond við okkara samstarvsfelagar, bæði í Nordics og í ESNA, umframt at fáa innlit í politiska spælið í talvheiminum. Stutt eftir aðalfundin í ECU var aðalfundur í FIDE. Til hendan fundin umboðaði næstforkvinnan, Katrin Didriksen Apol, TSF. Aðalfundurin hjá FIDE var sjálvsagt merktur av, at tað var valár og kríggi millum Russland og Ukraine, so støðan rundan um FIDE forsetan Arkady Dvorkovich, ið er russi og nær standandi Vladimir Putin, var sjálvsagt spent. Hesin aðalfundur var eisini eitt gott høvið at netverka og læra okkum spælið, ið er rundan um telvingina.
Samanumtikið hevur hetta árið verið merkt av nógvum virksemi, bæði til kappingar og til fundarvirksemi, og tað fyrsta árið eitt tíðarskeið, ið ikki hevur verið avbrotið av corona.